**Fylgiskjal** **Dagfesting 26. februar 2025**
**LUM 24/21799**

# Eftirlitsvitjan tann 19. november 2024 á Gerðisgarði í Skálavík

## Samanumtikið og tilmæli

Á eftirlitsvitjanini sýndist Gerðisgarður sum ein bústovnur við hóskiligum umstøðum til tey 7 fólkini, sum búðu har. Gerðisgarður var væl viðlíkahildin innan, men trongdi til ábøtur uttan. Ætlan var løgd fyri neyðugu umvælingarnar uttandura. Á Gerðisgarði hava tey lagt seg eftir, at hava Gerðisgarð so heimligan sum gjørligt, og í sambandi við innrætting og prýðing av stovninum, er atlit tikið at kendum ráðum innan demensvinarliga innrætting.

Við útgangsstøði í hesum er tað samanumtikið fatanin hjá umboðsmanninum, at talan er um ein stovn, ið hevur rímiliga góðar karmar til sítt virksemi. Eisini er tað fatanin hjá umboðsmanninum, at stovnurin hevur ein starvsfólkahóp við neyðugari fakligheit at taka sær av búfólkunum á Gerðisgarði. Arbeiðið tykist væl skipað við stórum denti løgdum á, at talan er um búfólk, sum hava demens av ymiskum slagi, at halda tey virkin eftir evni, eins og at geva teimum innihaldsríkar dagar.

Grundað á samrøðuna við leiðsluna í Økistænastuni fyri Sandoyar Sýslu og leiðsluna fyri Gerðisgarð og skjølini, ið umboðsmaðurin hevur fingið útvegað frá stovninum, hevur umboðsmaðurin soljóðandi viðmerkingar og tilmæli, sum eru skipað í punktum, ið vísa til brot í frágreiðingini:

**Samstarvsráð**
Undir vitjanini varð upplýst, at einki samstarvsráð var skipað. Vísandi til at tað, sambært § 15 í Eldralógini, er eitt lógarkrav, at velja eitt samstarvsráð á hvørjum røktarheimi, heitti umboðsmaðurin í fyribilsfrágreiðing síni á leiðsluna fyri Gerðisgarð um at velja og skipa eitt samstarvsráð fyri stovnin. Tann 21. januar 2025 fekk umboðsmaðurin kunning um, at samstarvsráð var skipað.

Við tað, at tilmælið um at skipa samstarvsráð er tikið til eftirtektar, hevur umboðsmaðurin ikki meira at viðmerkja til hesi viðurskifti.

**Trygd, møguligur harðskapur**
Í sambandi við umrøðu av spurninginum um harðskap á stovninum, vísti umboðsmaðurin á, at verbalar hóttanir eisini kunnu fatast sum harðskapur, og fyri trygdina og trivnaðin hjá starvsfólkum er neyðugt at hava fokus á slíkar støður og skráseta tær, um farið verður út um mark.

Í fyribilsfrágreiðingini mælti umboðsmaðurin Gerðisgarði til at gera skrivliga mannagongd fyri, hvussu harðskapstilburðir skulu handfarast og skrásetast.

Tann 21. januar 2025 fekk umboðsmaðurin kunning um, at mannagongd nú er gjørd viðvíkjandi harðskapi og hóttanum. Mannagongdin er løgd inn í teirra kunningarskipan, og starvsfólk hava fingið kunning.

Umboðsmaðurin tekur til eftirtektar, at Gerðisgarður hevur gjørt skrivliga mannagongd fyri, hvussu harðskapur og hóttanir skulu handfarast og skrásetast.

**Trygd, tvingsil**

Á Økistænastuni í Sandoyar Sýslu høvdu tey kunnað seg um Tvingsilslógina. Í tveimum førum høvdu tey søkt Kærustovnin um góðkenning til tvingsilsinntriv yvirfyri búfólkum á Gerðisgarði. Umsóknirnar vórðu báðar góðkendar. Frá Økistænastuni varð viðmerkt, at tað var sera arbeiðskrevjandi at gera slíkar umsóknir.

Gerðisgarður sýndist sostatt at arbeiða samsvarandi lógini um tvingsil. Umboðsmaðurin hevur tí ikki meira at viðmerkja til hesi viðurskifti.

**Bygningurin**

Gerðisgarður í Skálavík varð bygdur í 1990, men ikki tikin fult í nýtslu fyrr enn í 1998. Gerðisgarður sýndist sum væl viðlíkahildin innan, meðan uttan var stovnurin tó ikki so væl viðlíkahildin. Sambært støðulýsing, gjørd í januar 2024, sum umboðsmaðurin fekk avrit av, er tíðin komin til, at bæði vindeygu og klædningur mugu skiftast, og bøtast má um grundina.

Umboðsmaðurin tekur til eftirtektar, at ætlan er løgd fyri við tær neyðugu umvælingarnar uttandura, sum nevndar eru í støðulýsing frá januar 2024, og at miðað verður ímóti, at hesar ábøtur eru framdar innan 1 til 3 ár.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður